# Krossarnir á Toftanesi og fyrsti kristindómurin í Føroyum



*Steffen Stummann Hansen, Landsantikvarur*

Sambært Føroyingasøgu varð kristindómurin settur í gildi í Føroyum um ár 1000. Við staðfestingini av teimum báðum krossunum úr træi, sum fundnir vórðu í grevstrinum í víkingaaldargarðinum á Toftanesi í Leirvík, er nú fingin ein ítøkilig fráboðan um, at eitt kristi samfelag hevur verið har á staðnum fyri ár 1000 (Mynd 1-2). Fundirnir á Toftanesi eru tískil ein álvarslig avbjóðing til ta vanligu uppfatanina av tí fyrsta kristindóminum í Føroyum. Latið okkum tí royna at seta hesar báðar krossar inn í ein størri mentanarligan samanhang.

Fyrsti spurningurin kann verða: Eru slíkur krossar kendir aðrastaðni? Ja, úr norðbúgvagravum í kirkjugarðinum á Herjolvsnesi í Suðurgrønlandi. Tá ið grivið varð har fyri umleið 100 árum síðani, vórðu funnar nógvar gravir, sum av grevstrarleiðaranum, Poul Nørlund (seinni stjóri á Danmarks Nationalmuseum) vórðu tíðarfestar til miðøld, umleið 1150 til 1450. Gravirnar eru fyrst av øllum kendar fyri tey sera væl varðveittu klæðini, men har vórðu eisini funnir umleið 60 krossar úr træi, sum í mongum føri eru lagdir omaná bringuna á teimum deyðu ella omaná kistulokið. Longdin av hesum krossum er frá 11 cm til 69 cm (Mynd 3).

Krossarnir á Toftanesi líkjast á nógvum økjum teimum grønlendsku bæði í skapi og stødd. Tað er valla nakar ivi um, at annar av krossunum er eftir írskari fyrimynd — ein sonevndur "keltiskur krossur". Hetta slagi av krossum er nógv til av á Herjolvsnesi, og Poul Nørlund skrivaði í 1924 soleiðis: "vit eru so heppin millum krossarnar á Herjolvsnesi, at hava minst ein bólk við so sermerktum skapi, at teirra uppruni kann staðfestast við størsta neyvleika. Tað er tað væl kenda sniðið við sirkulrundum útholingum í hornunum, summir víðir opnir hálvsirklar, aðrir smáir næstan afturlatnir cirklar (....) Tað er tann einfaldi "Keltiski Krossurin", sum í so langa tíð var í brúki á steinminnisvarðum í teimum bretski oyggjunum, serliga í Skotlandi og Írlandi — bæði á standandi krossum og á gravsteinum (....) hetta einfalda skapið varð brúkt heilt niður í 12. øld".

Tá ið Poul Nørlund í 1924 almannakunngjørdi krossarnar á Herjolvsnesi, tulkaði hann teir sum líkkrossar. Henda tulking hongur helst samnan við, at teir allir vóru funnir á kirkjugarðinum, lógu sum nevnt á bringuni á tí deyða ella á kistulokinum. Hildið varð, at krossarnir vóru gjørdir í sambandi við sjálva jarðarferðina. Hóast aðrir krossar seinni vórðu funnir í grevstrum í bóndagørðum frá norðbúgvatíðini í Grønlandi, og ikki bert á kirkjugørðum, var tulkingin hjá Poul Nørlund av krossunum yvirhøvur galdandi hjá øðrum fakfólki.



*Krossarnir úr Norðbúgvakirkjugarðinum á Herjolvsnesi í Suðurgrønlandi.*

*Mynd: P. Nørlund: Buried Norsemen at Herjolfsnes. Meddelelser om Grønland 67:3, 1924.*

Við teimum grønlendsku krossunum sum grundarlag og øðrum krossum, t.d. frá Bryggjuni í Bergen, eru tey seinnu árini álvarslig spurnartekin sett við upprunaligu tulkingina hjá Poul Nørlund av krossunum sum líkrossar. Nógv vilja heldur tulka teir sum sonevndar andaktskrossar. Hesir krossar hava staðið inni í húsunum at verja húsfólkið og halda tí illa burtur. Tað, at krossarnir oftast eru spíðskaðir í niðara enda, bendir á, tí teir helst hava staði í einum haldara ella staka. Í summum førum, sum tað sæst á kirkjugarðinum á Herjolvsnesi í Suðurgrønlandi, hava krossarnir fylgt tí deyða í grøvina og harvið endaðir sum líkkrossar.

Men hví liggja so trækrossar á einum víkingaaldargarði í Leirvík, sum eftir tíðarfestingini er frá heidnari tíð?

Tað eru nógv dømir um eina sterka írska ávirkan á Føroyar í víkingaøld. Málfrøðingarnir Jakob Jakobsen og Christian Matras vísa á eina røð av írskum lániorðum í tí føroyska málinum. Í hesum sambandi er áhugavert at vísa á, at heiti á teimum nógvu summarbústøðunum frá víkingaøld, sum liggja burtur frá bygdum kring um í oyggjunum, ikki bera tað fornnorrøna heiti *sætr*, men harafturímóti tað fornírska heiti fyri sæter - *áirge* -, sum ein partur av staðarnavninum, td. Ergisdalur og Argisbrekka.

Í Íslandi eru funnar nógvar gravir frá víkingaøld við t.d. ríðiútgerð, bátum, vápnum og stórum prýðum til kvinnubúna, sum alt sermerkir heidnar gravir. Slíkar gravir eru ikki funnar í Føroyum. Tvey støð eru kend sum gravstøð frá víkingaøld, nevniliga *við Kirkjugarð* heima á Sandi og *yviri í Trøð* í Tjørnuvík. Gravirnar á Sandi eru tíðarfestar til 10. og/ella byrjanina av 11. øld, meðan gravirnar í Tjørnuvík eru tíðarfestar til 10. øld. Gravirnar á Sandi vendu allar eystur-vestur og tann jarðaði hevði fingið nakrar persónligar lutir við. Hetta eru bæði tekin um kristnar gravir. Ein av gravlutunum er ein vakurt lítið bronsuprýði av írskum uppruna. Í Tjørnuvík, har gravirnar høvdu fáar gravlutir, er tað mest sermerkta ein bronsunál av írsk-skandinaviskum sniði - helst framleidd í Dublin í víkingaøld. Tvær nálir av sama slagi eru eisini funnar á Toftanesi.



*Bønhústoftin í Leirvík.*

*Mynd: S. Stummann Hansen*

Um góðtakast kann, at fólk á Toftanesi - og í Føroyum sum heild - vóru kristin fyri ár 1000, kann tað vera ein frágreiðing um at ongar vanliga heidnar gravir eru funnar í Føroyum á sama hátt sum í Skandinavia, Írlandi, Skotlandi, Orknoyum, Hetlandi og Íslandi. Men hvar eru fólk í víkingaøld so jarðað? Svarið kann liggja í teimum sonevndu bønhúsunum, sum toftir eru av ymsa staðni í landinum. Hesir smáu kirkjubygningar hava ligið mitt í kirkjugarðinum, sum er sermerktur við at hava ein sirkulskapaðan garð allan vegin runt. Tann best varðveitta toftin av einum slíkum bønhúsi er í Leirvík (Mynd 4), og onnur góð dømi eru á Velbastað og í Mikinesi. Staðarnøvn eru prógv um, at nógv fleiri av hesum slagnum av bygningum hava verið kring oyggjarnar. Enn hevur eingin fornfrøðisligur grevstur verið gjørdur í nøkrum av bønhúsunum.



*Brot av krossi úr træi á Toftanesi. Krossurin, sum er eftir írskari fyrimynd, er varðveittur í 35,0 cm longd.*

*Mynd: Føroya Fornminnissavn*

Eitt áhugavert fyribrigdi við hesum bønhúsum er tann klingrutskapaði garðurin kring bønhúsið. Hetta skap er ikki kent frá samtíðini í Skandinavia, men kann metast at vera eitt fyribrigdi, sum hevur sínar røtur í tí elsta kristna umhvørvinum í Írlandi. Tað er kent allan vegin úr Írlandi, um Suðuroyggjar (Hebridurnar), Hetland, Føroyar, Ísland og til norðbúgvabygdirnar í Grønlandi. Bønhúsini eru søstatt enn ein ítøkilig ábending um, at tey vestastu víkingaaldarligu niðursetusamfeløgini í Norðuratlantshavi í stóran mun hava havt sterkar mentanarligar røtur í tí írska kristna økinum.

Niðurstøðan av hesum øllum er, at Føroyar av fyrstan tíð vóru undir sterkari írskari og harvið kristnari ávirkan - ella fyri at siga sum er: ein stórur partur av teimum fólkunum, sum búsettust her í víkingaøld, vóru írsk-kristin. Tjóðfrøðiliga sæð høvdu tey ein blandaðan skandinavisk-keltiskan uppruna. Tey komu óivað frá norðurlendingum, sum longu tíðliga í 800-árunum høvdu búsett seg í økinum kring Írskahavið, serliga í Suðuroyggjum, har tey eftir stuttari tíð gjørdust partur av tí kristna, keltiska samfelagnum. Tí er tað ikki løgi, tá ið íslendsku søgurnar sigur frá, at tey fyrstu landnámsfólkini høvdu keltisk og kristin nøvn.

At Føroyar seinni - í miðøld - kom undir norsku kirkjuna og kong og harvið inn í eitt reint skandinaviskt mentanarumhvørvi er eingin loyna. Men tað er nógv, sum bendir á, at í Føroyum vóru kristin fólk heilt frá byrjan, og at hesin kristindómurin hevur sínar røtur í Írlandi heldur enn í Skandinavia.



*Krossur úr træi á Toftanesi. Krossurin er varðveittur í 38,5 cm longd.*

*Mynd: Føroya Fornminnissavn*

## Var eitt kristi samfelag í Leirvík fyri ár 1000?

TÍÐINDASKRIV

Tá ið Føroya Fornminnissavn í 1982-1987 hevði fornfrøðiligan grevstur í víkingaaldartoftunum á Toftanesi í Leirvík, komu til sjóndar ein mongd av gripum, harímillum heilt nógvir lutir úr træi. Hvat ið hesir lutir í síni tíð vórðu brúktir til, var í flestu førum greitt beinanvegin. Har vóru skálir, skeiir, tunnustavir, spælibretti o.s.fr. Hesir gripir eru at síggja í framsýningini hjá Føroya Fornminnissavni í Brekkutúni 6 í Hoyvík. Tað var somuleiðis møguligt at tíðarfesta gripirnar, bæði eftir útsjónd, skapi og sniði, men eisini við C14 kanningum. Eftir hesum varð landnámsgarðurin á Toftanesi í Leirvík bygdur seinast í 800- ella fyrst av 900-árunum.

Ein granskingarjáttan frá SILA, Danmarks Nationalmuseums Center for Grønlands-forskning, hevur gjørt tað møgligt í hesum árinum at gjøgnumganga tað rúgvismikla tilfarið og úrslitini frá grevstrinum fyri at gera tað klárt til endaliga almenna framløgu. Okkurt nýtt er komið undan kavi, men serliga er eitt, sum kann hava stóran týdning fyri kunnleikan um elsta partin av okkara søgu. Hetta eru tveir krossar úr træi.

Annar er 38,5 cm langur og 19 cm breiður. Træ og tvørtræ eru fest saman við einum trænagla. Hugsandi er at krossurin hevur verið spískur í niðara enda (Mynd 1).

Hin krossurin ella partur av krossi er 35 cm langur. Hann er brotin í niðara enda, sum ætlandi eisini hevur verið spískaður. Hetta brotpetti hevur ein ferhyrntan part á miðjuni, og holað er inn í báðar síður bæði oman fyri og niðan fyri miðjuna. Eisini her er eitt hol mitt í, har trænagli hevur staðið í (Mynd 2). Brotpetti er tjúkri í ovara enda oman fyri innskurðirnar. Her er tvørtræið tó ikki funnið. Tað er neyvan nakar ivi um, at hetta er tað, sum eftir er av einum krossi eftir írskari fyrimynd – ein sonevndur "keltiskur krossur". Báðir krossarnir er gjørdir úr lerkaviði, møguliga rekaviði úr Sibiria.

Teir báðir krossarnir eru funnir í teimum niðastu fláunum. Hetta merkir, at teir eru frá elstu tíð, búseting hevur verið á Toftanesi. Krossarnir kunnu sostatt førast aftur til ta tíð, tá ið garðurin av fyrstan tíð varð bygdur onkuntíð seint í 9. ella tíðliga í 10. øld. Miðaltalið fyri tær tríggjar C14 kanningarnar er 920 e.Kr.

Við krossunum á Toftanesi er nú funnið eitt ítøkiligt prógv um, at í Føroyum var eitt kristi samfelag framman undan, at Sigmundur Brestisson sambært Føroyingasøgu boðaði kristinboðskapin á tingi um ár 1000. Og krossarnir á Toftanesi eru ikki bara áhugaverdir í føroyskum samanhangi – teir eru nevniliga so vítt kunnugt elstu krossar úr træi , sum eru kendir í norðanlondum frá víkingaøld.

Teir báðir krossarnir verða eftir ætlan sýndir fram í framsýningini í Brekkutúni í vár.